**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0620.**
**Tíðarskeið: 22/03-29/03 - 2006**

---

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Arnold Henriksen, Marit Pedersen og Guðni Eríksson.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Prøvar av havtasku vórðu tiknir til Lise Ofstad. Hitin í trolinum varð skrásettur við miniloggarum. Hydrografistøðir skuldu takast við Seabird CTD og planktonprøvar við WP-2 glúpi.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 22/3 kl. 21. Tóku støðir bæði djúpt og grunt, men veðrið var vánaligt, at vit kláraðu ikki fimm djúpar støðir har suðuri (puntarnir 33, 42, 51 og 53 í stratum 18 og punt 53 í stratum 17). Vit tóku fýra hydrografistøðir/ætiprøvar, men máttu gevast við teimum fyri at klára so nógvar fiskistøðir sum møguligt. Vit tóku tilsamans 24 góðkendar fiskistøðir. Tað var sum heild sera lítið at fáa. Vit landaðu mikudagin 29/3 í Havn.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan (400) fyri hýsu, men kundi ikki vera størri fyri tosk ella upsa, tí so lítið var at fáa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 29. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Av tí at eingin túrur var á Føroyabanka í mars 2004 og 2005 varð samanborið við túrin í mars 2003. Tað var munadi minni at fáa av toski í mun til 2003 og onnur ár sum heild, og var toskurin smáur í mun til onnur ár. Eisini var minni av hýsu og upsa. Meira var hinvegin at fáa av gulllaksi og svartkjafti. Fiskurin var sum heild eitt sindur rak. Magakanningarnar vístu, at sera lítið var til av nebbasild. Vit fingu ongan merktan fisk.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 0620.

| Fiskaslag | Kg 2006 | Nytrur | Magar | Kg 2003 | Lutfall 2006/2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 2588.583 | 407 | 71 | 3866.458 | 0.67 |
| TOSKUR | 1226.845 | 290 | 59 | 17364.349 | 0.07 |
| UPSI | 632.715 | 308 | 53 | 678.006 | 0.93 |
| HAVMÚS | 559.742 | | | 404.924 | 1.38 |
| GULLAKSUR | 436.221 | | | 74.620 | 5.85 |
| SVARTKJAFTUR | 351.316 | | | 60.907 | 5.77 |
| LOLIGO | 177.372 | | | 145.782 | 1.22 |
| HAVTASKA | 77.056 | 10 (illicium) | | 24.985 | 3.08 |
| LONGA | 61.270 | | | 98.360 | 0.62 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 41.062 | | | 158.624 | 0.26 |
| SKRAMBUL | 39.113 | | | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 27.707 | | | | |
| LÁLLA | 25.515 | | | | |
| GLÝSUFISKUR | 24.644 | | | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 22.825 | | | | |
| KNURRHANI | 16.752 | | | | |
| STINGLAKSUR | 16.651 | | | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 15.100 | | | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 14.782 | | | | |
| KALVI | 12.230 | | | | |
| TUNGA | 11.355 | | | | |
| SANDSPRØKA | 7.559 | | | | |
| BLÁLONGA | 5.495 | | | | |
| BROSMA | 3.040 | | | | |
| BLÁRIDDARI | 2.410 | | | | |
| GLASKVOYSA | 2.377 | | | | |
| HÁVUR | 1.895 | | | | |
| NEBBASILD | 0.086 | | | | |
| Tilsamans | 6401.720 | 1015 | 183 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur0612d.doc.

Petur Steingrund